## Megrahi viknar

Libyski yvirgangsmaðirin Abdelbaset Ali al-Megrahi, sum varð latin leysur úr einum fongsli í Skotlandi herfyri, tí hann var so sjúkur, er versnaður nógv í seinastuni. Tað skrivar Reuters frá bróðuri hansara. Sagt verður, at hann hevur mist málið. Í 2001 bleiv Megrahi dømdur lívlangt fongsul fyri at hava ábyrgdina av, at eitt amerikanskt ferðamannaflogfar sprongdist uppi yvir skotsku bygdini Lockerbie stutt fyri jól í 1988. Men í summar valdu skotsku myndugleikarnir at geva Megrahi grið, tí hann var deyðasjúkur.



## Bin Laden gevur ljóð

Leiðarin í yvirgangsfelagsskapinum Al-Qaeda, Osama bin Laden, hevur aftur givið ljóð frá sær. Talan er um eina ljóðupptøku, og innihaldið er sum so ofta fyrr ætlað amerikonsku tjóðini. Millum annað sigur bin Laden, at tað var amerikanski stuðulin til Ísraels, sum fekk Al-Qaeda at fremja atsóknina tann 11. september í 2001. Bin Laden mælir amerikanska fólkinum til at noyða Obama, forseta til at gevast við at styðja ísraelsmenn, og hann sigur tað vera tekin um veikleika hjá Obama, at hann lat verjumálaráðharran hjá Bush, Robert Gates, halda fram í starvinum.

# Ber væl til at flyta ei



*Bygdarmyndin á Toftum broytist, so hvørt, sum framtíðin krevur sítt*



**- Tað gekk rættiliga væl at koyra við húsunum uppi á trailaranum, og eg hevði ikki trúð, at eini heil hús kundu standa so væl á vogninum, sum tey gjørdu, sigur maðurin, sum koyrdi trailaran, Magnus D. Joensen**

FLUTNINGUR

*Orð: Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*
*Myndin: Sørin Djurhuus*

Seinasta hósdag fór RTS Contractors í Lamba í holt við eina stóra og at síggja til trupla uppgávu. Húsini, sum Palli og Fía Højgaard áttu dygst við sjóvarmálan innanfyri Oyrarnar á Toftum, skuldu takast av grundini og flytast til Lambar á trailara.

Nes kommuna hevur seinastu árini átt hesi hús, sum felagið í Lamba hevur keypt til skrivstovuhølir.

Nú kommunan hevur lagt út nýtt ídnaðarøki Inni á Rætt, og virksemið har inni longu er byrjað, samstundis sum ymiskt annað virksemi er í stoypiskeiðini, stóðu hesi húsini heldur illa fyri ímillum Oyrarnar og økið Inni á Rætt.

Tann stóri parturin av fyrireikingararbeiðnum til flutningin var fingin frá hondini, áðrenn trailari hjá RTS og stórur krani hjá Løvubetong komu út á Toftir.

Sterkir dragarar vórðu lagdir undir húsini, og innstalatiónir vórðu loystar.

### Stívliga 24 tons

Magnus D. Joensen, sum arbeiðir hjá RTS Contractors og førdi trailaran, sum flutti húsini, sigur, at hann dagin fyri stóru uppgávuna eisini hevði koyrt við einari stórari "rammu" uppi á trailaranum, sum var gjørd í somu støddsum húsini.

- Húsini eru 10 metrar long og 6,40 metrar breið. Við úthangi og takrennu eru tey 6,90 metrar breið.

Hann sigur, at tað var rættiliga trongt at sleppa niðan um svingið við gamla Turkihúsið á Toftum, men teir høvdu frammanundan lagt nakað av tilfari út har, so betri var at koyra.

- Truplasti teinurin var tó undir gomlu smiðjuni í Oyrunum, men við teimum royndum, vit høvdu gjørt við rammuni dagin fyri, vistu vit, at eisini hetta átti at bera til.



*Trongligt er at sleppa niðan um gamla Turkihúsið*

Magnus sigur, at Jan Erik Johannesen førdi kranan hjá Løvubetong, og hann kundi siga, at húsini vigaðu stívliga 24 tons. Kaminan var ikki tikin niður, men ein dragari var settur undir hana.

- Eg vil siga, at tað gekk rættiliga væl at koyra við húsunum uppi á trailaranum, og eg hevði ikki trúð, at tey kundu standa so stútt á vogninum, sum tey gjørdu.

Tá Magnus var komin eftir høvuðsvegnum og inn um Saltnes við húsunum, snaraði hann oman á Fjøruvegin í Runavík og koyrdi eftir havnalagnum heim undir Teymavirkið og Eik.

- Eg steðgaði ein hálvan tíma ella so her niðri, tí jarðarferð var um somu tíð. Síðan koyrdi eg niðan aftur á høvuðsvegin við Høgaból og síðan inneftir.

Hann sigur, at neyðugt var ongantíð at flyta ella snara nøkrum lyktapela ella skelti.

### Ber væl til

- At flyta eini sethús er ein stór uppgáva, sum skal fyrireikast rættiliga væl, men hetta letur seg væl gera, um umstøðurnar, og fyrireikingarnar eru í lagi.

Magnus sigur, at tað tók ikki nógv meira enn eitt korter at flyta húsini av Toftum og inn á havnalagið í Runavík og nakað tað sama at koyra inn til Lambar. Tá er tann tíðin drigin frá, sum tað tók at sleppa niðan úr Oyrunum og bíðitíðin á havnalagnum í Runavík.

- Vit fóru av Toftum umleið klokkan 13 og vóru soleiðis í Lamba umleið klokkan 14.30, sigur hann.

Einir sjey mans tilsamans vóru um uppgávuna at flyta húsini av Toftum til Lambar.

Tað eru brøðurnir, Svend og Andrias Lamhauge, sum eiga felagið RTS Contractors, og ætlanin er at rigga húsini til skrivstovu.

Húsini standa í fyrstu syfti á einum grundøki í Lamba, sum Magnus eigur, men felagið eigur eitt øki við síðuna av. Tá grund er stoypt á økið hjá RTS, verða húsini flutt yvir hagar.

### 50.000 krónur

Vit hoyra av og á um hús, sum verða flutt og sett á aðra grund.

Vit spurdu tí Magnus D.